**Formula-deildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 10 | 8 | - | 0 | - | 2 | 20 | 10 | 10 | 24 |
| 2 B36 | 10 | 7 | - | 2 | - | 1 | 19 | 7 | 12 | 23 |
| 3 NSÍ | 10 | 7 | - | 0 | - | 3 | 17 | 10 | 7 | 21 |
| 4 HB | 10 | 5 | - | 2 | - | 3 | 23 | 16 | 7 | 17 |
| 5 GÍ | 10 | 4 | - | 2 | - | 4 | 16 | 21 | -5 | 14 |
| 6 Skála | 10 | 4 | - | 1 | - | 5 | 11 | 15 | -4 | 13 |
| 7 B71 | 10 | 3 | - | 3 | - | 4 | 19 | 17 | 2 | 12 |
| 8 KÍ | 10 | 3 | - | 2 | - | 5 | 20 | 17 | 3 | 11 |
| 9 AB | 10 | 1 | - | 2 | - | 7 | 13 | 23 | -10 | 5 |
| 10 VB/S | 10 | 1 | - | 0 | - | 9 | 7 | 29 | -22 | 3 |

**1. deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B68 | 10 | 9 | - | 1 | - | 0 | 33 | 7 | 26 | 28 |
| 2 FSV04 | 10 | 8 | - | 1 | - | 1 | 23 | 9 | 14 | 25 |
| 3 ÍF | 10 | 6 | - | 3 | - | 1 | 28 | 9 | 19 | 21 |
| 4 LÍF | 10 | 5 | - | 1 | - | 4 | 27 | 16 | 11 | 16 |
| 5 NSÍ | 10 | 4 | - | 0 | - | 6 | 18 | 22 | -4 | 12 |
| 6 TB | 10 | 3 | - | 2 | - | 5 | 13 | 10 | 3 | 11 |
| 7 HB | 10 | 3 | - | 1 | - | 6 | 12 | 24 | -12 | 10 |
| 8 KÍ | 10 | 3 | - | 1 | - | 6 | 12 | 25 | -13 | 10 |
| 9 SÍ | 10 | 2 | - | 1 | - | 7 | 11 | 23 | -12 | 7 |
| 10 B36 | 10 | 1 | - | 1 | - | 8 | 7 | 39 | -32 | 4 |

# mba vantar liðformann




*Fróði Clementsen er ivasamur, men Dan Djurhuus ikki verður við, tá AB og VB/Sumba bresta saman á Argjum*

### Bárður Johannesen í EB/Streymi

Veruleikin er nevniliga tann, at spæliloyvi hjá Bárður Johannesen liggur hjá EB/Streymi. Tá Gunnar á Steig skifti til B68 stóð EB/Streymur brádliga og vantaði ein eykamálmann.

Men felagsliðið bar skjótt at, og áðrenn flytingarvindeyga lat aftur, høvdu teir tryggjað sær spæliloyvi hjá Bárður Johannesen. Hann venur tó ikki við EB/Streymi, men er klárur at traðka til, um René Tórgarð gerst skaddur.

Ein triði møguleiki hjá AB er at leiða Tór Thomsen hjá NSÍ.

### Hava góðar vónir

Men uttan mun til hvør aftasti skansin hjá AB verður, so hevur liðformaðurin góðar vónir til dagsins dyst.

– Vónirnar eru góðar, sjálvandi eru tær tað, og ein dystur móti VB/Sumba skal vinnast. Tað fara vit eisini at gera, sigur Jákup Martin Joensen avgjørdur.

Sama sigur Dan Djurhuus hjá VB/Sumba.

– Vónirnar mugu vera góðar, og tað eru tær eisini. Vit ætla okkum sigurin, og alt gott um AB, men tað er altso eitt lið, vit skulu vinna, sigur liðformaðurin hjá VB/Sumba. Hann fer at stuðla lið sínum frá síðulinjuni, tí ein vøddaskaði forðar honum í at spæla.

– Eg skal siga tær, at tað er so nógvar ferðir verri, tá tú ikki ført verið á vøllinum og hjálpt til, sigur Dan Djurhuus.

### AB favorittur

Liðini spældu móti hvørjum øðrum í ársins fyrsta landskappingardysti. Tað var á Eiðinum í Vági, har VB/Sumba vann 1-0. Hetta var besta byrjanin í fimm ár, vóru suðuroyingar skjótir at staðfesta, men síðani hevur einki gingið eftir vild hjá teimum. Liðið hevur tapt hvønn einasta av hinum níggju dystunum. Og níggju tap á rað er tyngjandi – eisini fyri suðuroyingar.

AB hevur eisini eins og VB/Sumba vunnið ein dyst. Tað var á útivølli móti Skála í fjórða leikumfari. AB hevur eisini leikt javnt móti bæði GÍ og HB, umframt at teir eisini sendu B36 út úr steypakappingini. Aftrat hesum kemur eisini tann veruleikin, at ósigrarnir hjá AB ikki hava verið eins lemjandi og teir hjá VB/Sumba. Tað sæst eisini aftur á málúrtøkuni, har tann hjá AB sigur –10 og tann hjá VB/Sumba –22. Við hesum havandi í huga, og so tað, at AB hevur heimavøll, ber illa til at siga annað enn, at teir mugu metast sum lítlir favorittar í avgerandi dystinum 2. hvítusunnudag, har taparin helst skal rokna við at flyta niður.

## Við – ikki við

**Ivasamur:** Jákup á Borg
**Leikbannaður:** Milan Kuljic

**Skaddir:** Julian Samulsen (knæskaði), Kaj Ennigarð (knæskaði)
**Leikbann:** Høgni Madsen
**Ivasamur:** Paul Clapson (lærskaði), Heðin á Lakjuni (eygnaskaði)

**Skaddur:** Pól Thorsteinsson

**Allir tøkir**
**Við aftur:** Poul N. Poulsen

**Skaddur:** Dan Djurhuus (vøddskaði)

# í Klaksvík

| | '06 | 06 | 05 | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| KÍ-B36 | 0-1 | - | 0-2 | - | 0-1 | 1-2 | 2-3 | 1-2 | 2-1 | 3-2 | 1-1 | 2-4 | 2-1-7 | 12-19 |
| NSÍ-B71 | - | - | - | - | - | - | - | 3-2 | 1-1 | 4-0 | - | 3-1 | 3-1-0 | 11-4 |
| HB-Skála | 1-1 | - | 1-2 | - | 4-1 | 3-0 | 5-0 | - | - | - | - | - | 3-1-1 | 14-4 |
| EB/S-GÍ | 2-3 | 2-1 | 1-1 | - | 1-1 | 4-2 | 1-2 | 1-1 | - | - | - | - | 2-3-2 | 12-11 |
| AB-VB/S | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |